# Alitíðindi

**Fiskaaling p/f 430 Hvalvík**

**NR 4 - 1996**

# Alivinnan á sjónum

## Hagtøl fyri alibrúk á sjónum í 1995 og fyrra hálvár í 1996

Andrias Reinert

Inngangur

Spurnarbløð vórðu send øllum alistøðum á sjónum í mai mánað 1996, og síðani varð vitjað á alistøðunum kring landið. Tá vitjað varð, vórðu í mongum førum ivamál viðvíkjandi spurningum greidd, og høvið nýtt til at fáa svarað øllum spurningum á bløðunum. Flestu alistøðir vórðu vitjaðar í juni mánað, og umframt upplýsingar um vinnuna í 1995, varð tá eisini spurt um gongdina í 1996, til 01.06.

Yvirhøvur hava alarar víst stóran áhuga fyri arbeiðinum at savna inn hagtøl um alivinnuna, og eiga teir tøkk uppiborna fyri tað eyka arbeiði, sum tað hóast alt er, at fáa hesi tøl til vega.

## Almenn viðurskifti.

Tikið verður saman um tað, sum alarar hava svarað upp á spurningarnar, ið settir vórðu fyri árið 1995 og í summum førum til og við mai 1996.

Alistøð.

Tilsamans høvdu 21 feløg fisk í sjónum 31.12.1995 og aldu á 33 ymiskum plássum. Einstøk feløg ala á fleiri plássum, sum verða rikin sum eindir fyri seg, og tí vórðu spurnarbløð send til 23 støðir. 22 støðir hava svarað spurningunum, og latið tilfarið aftur. Listi yvir allar alistøðirnar er á Mynd 1 á næstu síðu og tey 33 plássini, sum alt varð á, eru avmerkt á kortinum. Smoltstøðirnar eru somuleiðis avmerktar á kortinum.

Samstarv

Seks alistøðir høvdu einki beinleiðis samstarv við aðrar ali- ella smoltstøðir, meðan allar hinar høvdu ávíst samstarv, sum útgreinað niðanfyri (Talva 1).

Talva 1. Samstarv millum alistøðir og onnur virki.

| Samstarv | Alistøðir |
|---|---|
| Viðvíkjandi lívfiski | 4 |
| Keyp av smolti | 15 |
| Røkt av fiski | 7 |
| Søla av matfiski | 11 |
| Keyp av útgerð | 5 |
| Annað samstarv | 10 |

Annað samstarv kann eitt nú vera felags leiðsla. Keyp av útgerð og røkt av fiski er bert millum støðir, sum arbeiða neyvt saman. Í onkrum føri hevur felags røkt av fiski tó verið í samband við fyribils skiftisøki.

Umhvørvi

Í spurnarbløðunum verður spurt um minsta og mesta dýpi har støðin liggur, og um hita í sjónum.



Mynd 1. Smolt- og alistøðir pr 31.12.95

Yvirhøvur liggja alistøðirnar í Føroyum á lutfalsliga grunnum vatni í mun til eitt nú alistøðir í Noregi ella Chile. Nógvar alistøðir hava nótir á 10 metra dýpi, og onkur alistøð



hevur 60 m vatn har djúpast er. Yvirhøvur er dýpið 20 - 40 m har alistøðir liggja, og hitin í sjónum er máldur úr 4,4 stigum upp í 11 stig.

<u>Støðd á alistøðum</u>

Umframt tey nevndu 21 feløg, sum høvdu fisk í sjónum pr. 31.12.1995, vóru 2 feløg sum bert aldu lívfisk. Talið av alarum er sostatt minkað nógv tað sum farið er av 90-árunum, men hinvegin eru flestu alistøðirnar vaksnar munandi í vavi, og alieindirnar, sum nýttar verða at ala í, eru sum heild væl størri í dag.

Teir fyrr so vanligu 40 m ringarnir, verða nú bert nýttir til heilt smáan fisk á summum støðum, og eitt nú til at flyta fisk við.

Talva 2a vísir hvussu nógvar nótir av teimum ymisku støddunum, alarar nýta á alistøðunum í hvørjum aliøki sær, og tilsamans í øllum landinum. Aliøkini eru her tey somu, sum vórðu umtalaði í Alitíðindi 3-1996.

Talva 2a. Tal og ummál á alieindum, hvørt aliøki sær.

| Ummál í m á alieindum | 40 | 4x 12 | 50 | 4x 15 | 60 | 70 | 80 | 96 | 118 | 128 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoyar | 25 | | - | 10 | 88 | - | 6 | 2 | 3 | 1 |
| Eysturoy E | 24 | 12 | 14 | 32 | 57 | - | 3 | 11 | 3 | 1 |
| Miðøkið | 23 | | - | 12 | 46 | 16 | 1 | 5 | - | 2 |

| | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vestanfyri | 6 | | 15 | 32 | 11 | - | 2 | 4 | - | 1 |
| Suðuroy | 2 | 10 | 10 | 8 | 10 | | | | | |
| Tal íalt | 80 | 22 | 39 | 94 | 212 | 16 | 12 | 22 | 6 | 5 |

Av tí at tað fyribils ikki hevur verið alt á fleiri plássum vegna sjúku, er talið av nótum við fiski í, serstakliga í Miðøkinum, Vestanfyri og í Suðuroy, nógv ávirkað av hesum. Útgerð er eitt nú flutt til fyribils skiftisøki.

Í aliloyvunum verður givið loyvi til "í mesta lagi" eitt ávíst tal av $m^2$, og aliloyvi kunnu sambart løgtingslóg nr. 85 frá 19. juni 1990 verða givin upp til í mesta lagi 6000 $m^2$. Talva 2b vísir, hvat vanligastu sløgini av alieindum svara til í $m^2$ . Eisini sæst samlað tal og vídd av øllum ringum á teimum 22 alistøðunum.

Leggja vit saman høvdu tær 22 støðirnar 144.416 $m^2$ av nótum at ala í pr.31.12.1995, ella 6.564 $m^2$ í part. Leggja vit øll aliloyvini í landinum saman, eru tey tilsamans uppá 60.500 $m^2$.

Talva 2b. Roknað øki í vatnskorpuni av alinótum í Føroyum

| Ummál m | Øki $m^2$ | Nótir stk | Øki í alt $m^2$ |
|---|---|---|---|
| 40 | 128 | 78 | 9.984 |
| 4x12 | 144 | 32 | 3.168 |
| 50 | 200 | 39 | 7.800 |
| 4x15 | 225 | 94 | 21.150 |
| 60 | 286 | 212 | 60.632 |
| 70 | 390 | 16 | 6.240 |
| 80 | 510 | 12 | 6.120 |
| 96 | 734 | 22 | 16.148 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 118 | 1.109 | 6 | 6.654 |
| 128 | 1.304 | 5 | 6.520 |
| Øki við nótum í alt | | | 144.416 |

# Goymsla - livandi fiskur

Fremsta endamálið við at senda alarum spurnarbløð og at vitja á alistøðunum er at fáa so góða vitan sum til ber um fiskin, sum svimur í nótunum kring landið. Hvussu nógv er eftir av hvørjum árgangi? Hvat vigar fiskurin? Hvussu er trivnaður og heilsustøða? o.s.fr.

Tølini sum inn eru komin fyri hvørt aliøki sær, eru sett saman í talvunum 3a - 3i. Spurt er um hvønn árgang sær, og roynt er at skilja ímillum vár- og heystsmolt, og somuleiðis millum laks og síl. Har alarin ikki hevur skilt ímillum vár- og heystsmolt á spurnarbløðunum, er meting gjørd í hvørjum einstøkum føri um býtið. Í onkrum føri er eisini meting gjørd av lutfalli millum laks og síl, tá eitt nú bert tonsini, sum tikin eru, eru uppgivin samlað.

Laksur - árgangur 1994

Av teimum 2.671.000 laksunum, sum eru eftir av hesum árgangi, eru 41 % í Eysturoy E, 28 % í Norðoyum, 18 % í Miðøkinum, 8 % í Suðuroy og 4 % Vestanfyri (Talva 3a). Ein av orsøkunum til at so lítið av fiski er í Suðuroy og Vestanfyri, er sum nevnt undir "Støðd á alistøðum", at ikki hevur verið alt á fleiri økjum vegna sjúku.

Talva 3a. Laksur í sjónum, árgangur 1994 pr.31.12.1995

| | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aliøki | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons |
| Norðoyar (-1) | 549 | 3,9 | 2144 | 110 | 1,2 | 132 |
| Eysturoy E. | 545 | 4,3 | 2359 | 553 | 1,2 | 643 |
| Miðøkið | 438 | 3,5 | 1531 | 39 | 1,9 | 74 |
| Vestanfyri | 94 | 3,7 | 348 | | | |
| Suðuroy | 35 | 4,0 | 140 | 190 | 1,2 | 228 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rokn.f.1.alistøð | 77 | | 296 | 41 | | 49 |
| Alt landið | 1738 | 3,9 | 6818 | 933 | 1,2 | 1126 |

Fyrst í juni er so mikið tikið av árganginum, og tá serstakliga av vársmoltinum, at bert 1.453.000 laksar ganga eftir (Talva 3b). Vársmoltið vigaði 3,9 kg um árskiftið og tað sum eftir gongur vigar nú 5,4 kg í miðal. Tilsvarandi tøl fyri heystsmoltið eru 1,2 kg og 3,0 kg.

Talva 3b. Laksur í sjónum, árgangur 1994 pr.01.06.1996

| | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aliøki | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons | Tal 1000 | Kg/ stk | Tons |
| Norðoyar (-1) | 84 | 5,7 | 481 | 90 | 2,6 | 234 |
| Eysturoy E. | 305 | 5,8 | 1757 | 530 | 3,1 | 1596 |
| Miðøkið | 165 | 4,5 | 740 | 39 | 3,6 | 140 |
| Vestanfyri | | | | | | |
| Suðuroy | | | | 177 | 2,5 | 443 |
| Rokn.f.1.alistøð | 25 | | 135 | 38 | | 109 |
| Alt landið | 579 | 5,4 | 3114 | 874 | 3,0 | 2512 |

Laksur - árgangur 1995

Av 1995 árganginum eru 6.309.000 eftir um árskiftið. 37 % av hesum eru í Eysturoy E, 34 % í Miðøkinum, 25 % í Norðoyggjum, 4,5 % í Suðuroy og bert 0,4 % Vestanfyri (Talva 3c).

Talva 3c. Laksur í sjónum, árgangur 1995 pr.31.12.1995

| | Vársmolt | Heystsmolt |
|---|---|---|

| Aliøki | Tal 1000 | G/ stk | Tons | Tal 1000 | G/ stk | Tons |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Norðoyar (-1) | 919 | 996 | 915 | 384 | 58 | 22 |
| Eysturoy E. | 1187 | 600 | 712 | 1116 | 87 | 97 |
| Miðøkið | 1566 | 706 | 1106 | 552 | 82 | 45 |
| Vestanfyri | 24 | 417 | 10 | | | |
| Suðuroy | 82 | 573 | 47 | 205 | 70 | 14 |
| Rokn.f.1.alistøð | 171 | | 127 | 103 | | 8 |
| Alt landið | 3949 | 739 | 2917 | 2360 | 80 | 186 |

Fyrst í juni eru 6.036.000 laksar eftir. Sostatt er svinnið av 1995 árganginum 4,2 % í fimm mánaðir (Talva 3d). Hesa tíðina er vársmoltið vaksið úr 739 g í miðal um árskiftið upp í 1570 g, og heystsmoltið úr 80 g upp í 202 g.

Talva 3d. Laksur í sjónum, árgangur 1995 pr. 01.06.1996

| | Vársmolt | | | Heystsmolt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aliøki | Tal 1000 | G/ stk | Tons | Tal 1000 | G/ stk | Tons |
| Norðoyar (-1) | 866 | 2208 | 1912 | 330 | 218 | 72 |
| Eysturoy E. | 1075 | 1323 | 1422 | 1249 | 171 | 231 |
| Miðøkið | 1516 | 1391 | 2108 | 443 | 246 | 109 |
| Vestanfyri | 24 | 2208 | 53 | | | |
| Suðuroy | 81 | 1219 | 99 | 189 | 190 | 36 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Rokn.f.1.alistøð | 162 | | 254 | 101 | | 20 |
| Alt landið | 3724 | 1570 | 5848 | 2312 | 202 | 468 |

Síl - árgangur 1994.

Bert fá síl fóru á sjógv í 1994. Um árskiftið eru uppgivin 157.000 síl av hesum árgangi, og pr 01.06.1996 eru 73.000 síl eftir (Talva 3e).

Talva 3e. Ælabogasíl í sjónum, árgangur 1994 - Alt landið

| | Vársíl | | | Heystsíl | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Dato | Tal 1000 | G/ stk | Tons | Tal 1000 | G/ stk | Tons |
| Pr.31.12.1995 | 107 | 2028 | 217 | 50 | 511 | 26 |
| Pr.01.06.1996 | 43 | 3326 | 143 | 33 | 1500 | 49 |

Ælabogasíl - árgangur 1995

Væl fleiri síl eru av hesum árgangi, og býtið millum aliøkini er øðrvísi enn við laksinum (Talva 3f). Heili 61 % av sílunum eru í Miðøkinum, 21 % Vestanfyri, 10 % í Suðuroy, 6,6 % í Eysturoy og bert 1,3 % í Norðoyum.

Talva 3f. Ælabogasíl í sjónum, árgangur 1995 pr.31.12.1995

| | Vársíl | | | Heystsíl | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aliøki | Tal 1000 | G/stk | Tons | Tal 1000 | G/stk | Tons |
| Norðoyar | 10 | 1200 | 12 | | | |
| Eysturoy E | 28 | 850 | 23 | 23 | 91 | 2 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðøkið | 406 | 1066 | 433 | 61 | 100 | 6 |
| Vestanfyri | 102 | 800 | 82 | 60 | 100 | 6 |
| Suðuroy | 40 | 774 | 31 | 40 | 138 | 6 |
| Síl íalt | 586 | 971 | 569 | 184 | 109 | 20 |

Fyrst í juni eru 726.000 síl eftir (Talva 3g). Svinnið av 1995 árganginum hevur sostatt verið 6,1 % hesar fimm mánaðar. Býta vit svinnið á vár- og heystsíl, eru 4,6 % farin av vársílunum og 9,2 % av heystsílunum. Vársílini eru vaksin úr 971 g um árskiftið upp í 1712 g og heystsílini úr 109 g upp í 611 g pr. 01.06.1996.

Talva 3g. Ælabogasíl í sjónum, árgangur 1995 pr.01.06.1996

| | Vársíl | | | Heystsíl | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aliøki | Tal 1000 | G/ stk | Tons | Tal 1000 | G/ stk | Tons |
| Norðoyar | 10 | 2000 | 20 | | | |
| Eysturoy E. | 27 | 1800 | 49 | 22 | 600 | 13 |
| Miðøkið | 398 | 1744 | 694 | 56 | 700 | 39 |
| Vestanfyri | 84 | 1381 | 116 | 50 | 600 | 30 |
| Suðuroy | 40 | 1954 | 78 | 39 | 506 | 20 |
| Síl íalt | 559 | 1712 | 957 | 167 | 611 | 102 |

Laksur og síl á øllum alistøðunum tilsamans

Í Talvunum 3h og 3i er gjørt upp, hvussu nógv av sílum og laksi av árgangunum 1994 og 1995, sum svam í øllum alistøðunum kring landið tilsamans.

Talva 3h. Fiskur í sjónum pr. 31.12.1995

| Alt landið | Tal 1000 | Tons |
|---|---|---|
| Laksur árgangur 1994 | 2.671 | 7.944 |
| Laksur árgangur 1995 | 6.309 | 3.103 |
| Laksur íalt | 8.980 | 11.047 |
| Ælabogasíl árgangur 1994 | 157 | 243 |
| Ælabogasíl árgangur 1995 | 770 | 589 |
| Síl íalt | 927 | 832 |
| Fiskur íalt | 9.907 | 11.879 |

Talva 3i. Fiskur í sjónum pr. 01.06.96

| Alt landið | Tal 1000 | Tons |
|---|---|---|
| Laksur árg. 1994 | 1.453 | 5.626 |
| Laksur árg. 1995 | 6.036 | 6.316 |
| Laksur íalt | 7.489 | 11.942 |
| Ælabogasíl árg. 1994 | 76 | 192 |
| Ælabogasíl árg.1995 | 726 | 1.059 |
| Síl íalt | 802 | 1.251 |
| Fiskur íalt | 8.291 | 13.193 |

Vit síggja, at 11.879 tons av alifiski av hesum báðum árgangum svumu í nótunum pr. 31.12.1995. Pr. 01.06.1996 var so mikið tikið burtur av, at talið var minkað úr 9.907.000 fiskum niður í 8.291.000 fiskar, men samlaða vektin var tó komin upp á 13.193 tons.

# Tøka av alifiski.

Á Mynd 2 er útflutningurin av alifiski úr Føroyum avmyndaður, og vit síggja at 1995 er nógv slakasta av nítiárunum higartil, meðan útflutningurin í 1996 væntandi kemur upp aftur á eitt støði sum undanfarnu ár.




Mynd 2. Útflutningur av laksi og ælabogasílum síðani 1980.

Í Talvu 4 er tøkan í 1995 roknað sum rund bløðgað vekt, býtt á fyrrnevndu aliøki og fyrra- og seinna hálvár hvørt sær.

Talva 4. Laksur tikin í 1995.

| | Fyrra hálvár | | | Seinna hálvár | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aliøki | Tal 1000 | Kg/st | Tons | Tal 1000 | Kg/st | Tons |
| Norðoyar (-1) | 230 | 5,0 | 1158 | 44 | 3,4 | 148 |
| Eysturoy E. | 378 | 4,0 | 1499 | 440 | 3,3 | 1468 |
| Miðøki | 145 | 4,8 | 697 | 538 | 3,2 | 1705 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vestanfyri | 51 | 3,3 | 170 | 137 | 4,1 | 565 |
| Suðuroy | 63 | 5,3 | 333 | 35 | 5,1 | 178 |
| Rokn.f.eina støð | 39 | 4,5 | 175 | 54 | 3,4 | 185 |
| Tøka íalt | 906 | 4,5 | 4032 | 1248 | 3,4 | 4249 |

Samlað tøka av alifiski í 1995 í rundari vekt verður soleiðis:

| | Tal | Stødd, kg | Tons |
|---|---|---|---|
| Laksur fyrra hálvár | 906.000 | 4,5 | 4.032 |
| Laksur seinna hálvár | 1.248.000 | 3,4 | 4.249 |
| Laksur í alt | 2.154.000 | 3,8 | 8.281 |
| | | | |
| Ælabogasíl í alt | 30.000 | 2,6 | 77 |
| Tikin alifiskur í alt | 2.184.000 | 3,8 | 8.358 |

Til sammetingar kann nevnast at útflutningurin av aldum fiski í 1995, sambært tølum frá Hagstovuni, og alt roknað um til runda vekt var:

9.027 tons. Útflutningsvirðið av alifiskinum var 233.194.153 kr.

Í Talvu 5 er tøkan roknað á sama hátt sum í Talvu 4, men bert fyri 5 teir fyrstu mánaðarnar í 1996.

Talva 5. Laksur tikin í 1996.

| | Til 01.06.96 | | |
|---|---|---|---|
| Aliøki | Tal | Kg/stk | Tons |
| Norðoyar (-1) | 458 | 4,3 | 1972 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eysturoy E. | 577 | 4,3 | 2472 |
| Miðøki | 211 | 4,8 | 1020 |
| Vestanfyri | 92 | 4,6 | 427 |
| Suðuroy | 37 | 4,4 | 164 |
| Rokna f. eina støð | 63 | 4,4 | 275 |
| Tøka í alt | 1438 | 4,4 | 6330 |

Sambært spurnarbløðunum vórðu 34.000 síl á 3,7 kg = 125 tons

tikin fyrstu 5 mánaðarnar av 1996.

# Umrøða av nøgd av livandi fiski, felli og tøku.

*Hvussu samsvara tølini sum smoltstøðirnar góvu upp við talið av fiski í sjónum ?*

Laksur - árgangur 1994.

Sambart upplýsningum frá smoltstøðunum fingu alistøðirnar 3.937.000 vársmolt og 1.593.000 heystsmolt tilsamans í 1994. Hesi tøl nevna vit her "bruttotøl".

Sambært Talvu 4 á síðu 9 vórðu 1.248.000 laksar á 3,4 kg tiknir seinna hálvár í 1995. Hesir fiskar stavaðu frá vársmoltinum av ‘94 árganginum, og í Talvu 3a á síðu 5 síggja vit, at 1.738.000 fiskar á 3,9 kg vóru eftir av hesum vársmolti í sjónum pr.31.12.95.

Út frá hesum tølum eru 24 % av vársmoltinum í 1994 farin fyri skeyti av ymiskum orsøkum frá tí tey fóru á sjógv til 31.12.1995.

Av bruttotalinum, sum fór á sjógv á heysti 1994, vóru pr.31.12.1995 stívliga ár seinni 933.000 laksar á 1,2 kg eftir, ella 58,6 % av upprunatalinum. Hetta má sigast at vera sera stórt svinn, men 1994 var fyrsta árið, at nógv heystsmolt bleiv koyrt á sjógv í Føroyum, og ikki gekst nóg væl í hond hjá øllum.

Laksur - árgangur 1995.

Bruttotalið, sum fór í aliringarnar, varð uppgivið at vera 4.116.000 vársmolt og 3.643.000 heystsmolt.

Rokna vit sum omanfyri var eftir av bruttotalinum:

| Dato | Vársmolt, % | Heystsmolt, % |
|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| pr.31.12.1995 | 95 | 65 |
| pr.01.06.1996 | 90 | 63 |

Eisini í 1995 var sera stórt felli í smoltinum, sum varð sett út um heystið.

Síl - árgangur 1994.

Hóast smoltstøðirnar bert hava latið 109.000 vársíl og 47.000 heystsíl, so ganga tó á sjónum pr. 31.12.1995 107.000 vársíl á 2 kg og 50.000 heystsíl á 0,5 kg. Her er, sum vera man meira farið á sjógv, enn smoltstøðirnar hava uppgivið á spurnarbløðunum.

Síl - árgangur 1995.

Eisini av hesum árgangi gongur meira á alistøðunum enn smoltstøðirnar hava givið upp. Tað fóru 411.000 vársíl og 145.000 heystsíl á sjógv, men pr 31.12.1995 ganga 586.000 síl á 971 g og 184.000 síl á 184 g á sjónum!

Samanumtikið kan sigast

Øll hesi tøl um samsvar millum tað sum gongur á alistøðunum á sjónum, og tað sum er farið á sjógv, eiga sjálvandi at verða tikin við fyrivarni. Eitt nú hevur ikki verið óvanligt at smoltstøðir hava latið fisk fyri tað, sum ferst fyrstu tíðina í sjónum, og tá serstakliga fyri heystsmolt. Tó vísa tølini, at ov nógvur laksur enn fer fyri skeyti í føroysku alivinnuni sum heild, serstakliga fyrstu tíðina aftan á at hann er farin á sjógv, og størsti missurin er av heystsmoltinum.

Orsøkir til, at ov nógv fer fyri skeyti, eru m.a.:

- furunkulosa á smoltstøðunum
- B.K.D.
- heystsmoltini eru ov smá ella ikki smoltifiseraði
- ov langt er útligið áðrenn tey fara á sjógv

## *Hvussu nógvan alifisk avreiða vit íalt í 1996 ?*

Sum sæst í Talvu 4 á síðu 11 varð tikin nakað sama nøgd av laksi fyrra og seinna hálvár í 1995. Fyrstu 5 mánaðarnar í 1996 tóku vit, sambart spurnarbløðunum, 6.455 tons av alilaksi, og fluttu út, sambart tølum frá Hagstovuni, 6.613 tons.

Niðanfyri eru tvær forsagnir fyri tøkuna í ár. Fyrra forsøgnin byggir upp á, at tøkan restina av árinumi er jøvn og samsvarandi tøkuni fyrstu 5 mánaðarnar. Tá verður samlaða tøkan í 1996:

6.613x12/5 = 15.870 tons av alifiski, rund vekt.

Seinna forsøgnin byggir upp á talið av fiski í sjónum seinasta árskiftið. Í Talvu 4a. á síðu 9 síggja vit, at um árskifti 1995 - 96 gingu í nótunum á alistøðunum kring landið 11.047 tons av laksi og 832 tons av sílum.

Í 1993 og 1994, sum vóru tvey "vanlig" ár í alivinnuni í Noregi, var tøkan ávíkavíst 29% og 31% størri enn nøgdin av fiski í sjónum undanfarna árskiftið.

Minnir gongdin hjá okkum um hetta, fáa vit hetta úrslit:

11.047 x 1,30 = 14.361 tons av laksi rund vekt

832 x 1,30 = 1.082 tons av sílum rund vekt

Út frá hesum verður samlaða tøkan í 1966 : 15.443 tons rund vekt.

Báðir hesir mátar at meta um tøkuna av alifiski í ár liggja ímillum 15.000 og 16.000 tons í rundari vekt. Hesar forsagnirnar mugu sum vera man takast við fyrivarni.

# Serlig viðurskifti

Hagreiðingarvirki

Kring landið vóru 10 ymisk virki sum hagreiddu alifisk í 1995. Helvtin av hesum virkjum viðgera stórt sæð bert fiskin frá einari alistøð.

Fóður

Umframt fóður frá Havsbrún nýta alarar á sjónum 5 ymisk sløg av útlendskum alifóðuri. Onkur av hesum fóðursløgum verða tó bert nýtt á einari ella tveimum alistøðum.

Gevingarhættir.

Alt meira framkomin útgerð verður nýtt at geva fiskinum við. Hetta er neyðugt, tí nøgdin av fiski, sum verður ald á hvørjari alistøð, er í flestum førum vaksin nógv seinnu árini, og somuleiðis verða alt størri eindir nýttar at ala í.

Í stuttum kann sigast, at fiskurin í 1995 fekk fóður soleiðis:

- 3 alistøðir góvu øllum fiskinum við hond
- 7 alistøðir høvdu automatir til smáfiskin, og góvu størra fiskinum við hond.
- 5 alistøðir høvdu automatir til allan fiskin, og góvu við hond afturat.
- 7 alistøðir høvdu fóðurmiðstøð á landi ella á flaka.
- 10 alistøðir høvdu fóðurkanónir á bátunum.

Sum vera man nýttu fleiri alistøðir fleiri av hesum mátum at geva fiskinum.

Kynsbúning - Ljós

Ein av trupulleikunum í alivinnuni hevur verið, at millum 10 og 20% av fiskinum gerst kynsbúgvin longu aftan á fyrsta veturin í sjógvi. Hvussu stórur partur av fiskinum, sum gerst kynsbúgvin, hevur verið misjavnt frá einum ári til annað og frá eini alistøð til aðra.Við at hava ljós brennandi á alistøðunum myrku

árstíðina, hevur borið til næstan heilt at sloppið undan hesum trupulleika.

Av 21 alistøðum, sum hava svarað spurninginum, nyttu 6 als ikki ljós til fiskin. 2 alistøðir høvdu ljós í einar tveir mánaðar, men bert til heystsmoltið. 13 alistøðir høvdu ljós brennandi yvir fiskinum alla tað myrku tíðina av árinum (Talva 6).

Talva 6. Ljós á alistøðunum.

| Aldur á fiskinum | Ljósskipan | Alistøðir |
|---|---|---|
| Allur fiskur | Ikki nýtt ljós | 6 |
| Heystsmolt | Einar tveir mánaðir | 2 |
| Veturgamalt | Frá januar til mai | 5 |
| Veturgamalt | Frá desembur til apríl | 1 |
| Veturgamalt | Frá desembur til mai | 5 |
| Ikki svarað spurn. | | 2 |

Tað sær ikki út til at 1995 hevur verið av teimum vánaligu árunum til kynsbúning, tí har einki ljós hevur verið nýtt eru vanliga bert 5 - 10 % av fiskinum búnað eftir fyrsta veturin í sjógvi (Talva 7). Av fiskinum, sum hevur fingið ljós, er bert úr einum prosenti og niður í so gott sum einki búnað.

Talva 7. Kynsbúning - laksur. Fýra alistøðir hava ikki svarað spurninginum

| Uttan ljós | | Við ljósi | |
|---|---|---|---|
| Tal alist. | Kynsb. % | Tal alist. | Kynsb. % |
| 1 | 3 - 5 | 4 | 0,2 |
| 2 | 5 - 6 | 1 | 0,4 |
| 3 | 7 - 8 | 1 | 0,5 |
| 3 | 10 | 4 | 1,0 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | 12 - 20 | 1 | 0 - 3 |

Lús

Lúsaplágan hevur ikki verið av tí ringa hesi seinnu árini, og viðurskifti, sum hava bøtt munandi um hetta eru, at væl færri alistøðir nú liggja á hvørjum fjørði, og fleiri evni eru tøk at viðgera við.

Av tí at tølini fyri 1996 bert vísa lúsaviðgerð til og við mai mánað, ber ikki til at samanbera við 1995 sum heild (Talva 8). Men hyggur tú at einstøku spurnarbløðunum, sær tú at støðir, sum hava havt rættiliga góðan frið í 1995 á økjum, har lítið av fiski hevur verið eina tíð, verða verri plágaðar av lúsini í 1996, nú størri stovnur av alifiski er bygdur upp aftur á fjørðinum. Út á heystið hevur serstakliga "seiðalúsin" (Caligus) verið hervilig plága hjá alarum um alt landið.

Talva 8. Viðgerð fyri lús. Tvær alistøðir hava ikki svarað spurninginum

| Tal av | Tal av alistøðum | |
|---|---|---|
| viðgerðum | 1995 | 1996 til 01.06. |
| 0 | 8 | 11 |
| 1 | 1 | 5 |
| 2 | 5 | 2 |
| 3 | 1 | 3 |
| 4 | 2 | 0 |
| 5 | 2 | 0 |
| 6 | 2 | 0 |

Sjúka

Í Alitíðindi nr.3 1996 er stutt umrøða av vanligastu sjúkunum, sum hava gjørt um seg á alistøðunum í Føroyum. Nú alistøðir ikki longur liggja so tættar, og góð koppingarevni fáast fyri summar sjúkur, hava tíðindi um sjúku og lús í alivinnuni ikki verið so ógvuslig. At ein sjúka ikki er ávíst á eini alistøð, merkir tó, sum vera mann ikki, at fiskur á støðini ikki ber smittuna.

Talva 9. Sjúka ávíst á alistøðum. 1 alistøð ikki svarað spurninginum

| | Tal av alistøðum | |
|---|---|---|
| Sjúka ávíst | 1995 | 1996 til 01.06. |
| B.K.D. | 12 | 16 |
| Furunkulosa | 4 | 4 |
| Hjartaklovningur | 6 | 5 |
| Eingin sjúka ávíst | 6 | 5 |

Tølini í talvuni omanfyri benda á, at BKD sjúkan støðugt breiðir seg til nýggj aliøki, og er sera torfør at sleppa undan við tí arbeiðsgongd, sum hevur verið higartil í vinnuni.

Fólk á alistøðunum

Hvussu mong fólk, ið arbeiða beinleiðis á alistøðunum í teimum ymisku aliøkjunum, síggja vit í Talvu 10. Talið av fólki á smoltstøðunum er tikið úr spurnarbløðunum til smoltstøðir í januar í 1996.

Talva 10. Tal av fólki, sum arbeiðir beinleiðis á alistøðunum

| | Støðir á sjónum | | | Smoltstøðir | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Aliøki | Fast | Eyka | Íalt | Fast | Eyka | Íalt |
| Norðoyar | 17,0 | 4,0 | 21,0 | 12,0 | 2,0 | 14,0 |
| Eysturoy E. | 30,0 | 2,0 | 32,0 | 18,0 | 4,5 | 22,5 |
| Miðøkið | 24,0 | 6,5 | 30,5 | 7,0 | 2,0 | 9,0 |
| Vestanfyri | 5,0 | 1,5 | 6,5 | 10,5 | 5,0 | 15,5 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Suðuroy | 8,0 | 1,0 | 9,0 | 10,0 | 3,5 | 13,5 |
| Rokn.f.1.støð | | | 4,5 | | | |
| Fólk íalt | | | 104,0 | | | 75,0 |

Taka vit allar alistøðirnar á sjónum saman, vórðu avreidd góð 80 tons av fiski uppá fólkið, sum arbeiddu á støðunum. Samsvarandi tal í Skotlandi var 52 tons í 1995, og í Noregi 152 tons (í 1994 - 118 tons). Talið av smolti, sum smoltstøðirnar í Føroyum lótu uppá fólkið, var gott 111.000 smolt, meðan smoltstøðir í Skotlandi lótu 67.000 fiskar pr. fólk, og í Noregi149.000 fiskar í 1995 ( í 1994 - 128.000).

# Útflutningstøl

Tølini í Talvu 11a og 11b eru fingin til vega frá Hagstovuni. Allur útfluttur alifiskur og vøra gjørd burtur úr alifiski er roknað um til runda vekt av blóðgaðum fiski eftir hesum "lykli", sum er fingin frá Kassavirkinum á Bakka p/f:

100 % = rundur blóðgaður fiskur

85 % av rundari vekt = kruvdur fiskur

75 % av rundari vekt = avhøvdaður kruvdur fiskur

57 % av rundari vekt = flak við skræðu

49 % av rundari vekt = skrædlað flak

Virðið av útfluttu vørunum er somuleiðis frá Hagstovuni, og í seinasta teigi í talvunum er roknað, hvussu stórt útflutningsvirðið hevur verið í miðal pr. kg. av blóðgaðum, ókruvdum alifiski.

Tøkan av aldum sílum hevur frá 1990 til 1995 ligið í millum 60 tons og 855 tons (Talva 11a). Útflutningsprísurin lækkaði úr kr 28,31 pr kg í 1990 niður í kr 20,73 pr kg í 1994. Í 1995 var eitt kvink upp uppeftir.

Talva 11a. Útflutningur av sílum og prísgongd 1990 - 1995

| Ár | Útflutt<br>kg | Rund vekt<br>kg | Virðið<br>1000 kr | Kr/kg<br>Rund vekt |
|---|---|---|---|---|
| 1990 | 45.514 | 60.584 | 1.715 | 28,31 |
| 1991 | 489.857 | 627.176 | 15.995 | 25,50 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 1992 | 543.719 | 799.904 | 19.699 | 24,63 |
| 1993 | 714.293 | 854.516 | 19.606 | 22,94 |
| 1994 | 408.728 | 540.130 | 11.196 | 20,73 |
| 1995 | 63.974 | 83.569 | 1.804 | 21,60 |

Tøkan av aldum laksi hevur frá 1990 til 1995 ligið í millum 8900 tons og 18300 tons, hægst í 1992 og lægst í 1995 (Talva 11b). Ein av orsøkunum til at nøgdin av laksi minkaði so nógv frá 1994 var, at stórt tal av laksamaðkapirrum vóru fyribeindar á heysti 1991 og á vári 1992 vegna furunkulosu og at smoltstøðirnar síðani lógu við lítlum ella ongum fiski í eitt ella tvey ár.

Nøgdin av laksasmolti, sum er sett við síðani 1991, hevur verið:

| | |
|---|---|
| 1991 | 8.136.000 |
| 1992 | 4.502.000 |
| 1993 | 5.150.000 |
| 1994 | 5.530.000 |
| 1995 | 7.759.000 |

Fleiri ymisk viðurskifti virkaðu síðani til, at bert sløk 9.000 tons av laksi vóru tikin í 1995:

- Umframt at bert góðar 5 milliónir av laksasmolti fóru í aliringarnar í 1993 og 1994, vóru smoltini í 1994 lutfallsliga smá mest ársaka av veðurviðurskiftum.
- Vøksturin á 1994-árganginum var tí seinkaður
- Prísurin á markanaðinum tá 1995 fór at halla var so vánaligur, at væl av fiski, sum kundi verið tikin, tá var gangandi inn í 1996.

Útflutningsprísurin lækkaði úr kr 34,03 pr kg í 1990 niður í kr 25,63 pr kg í 1994. Í 1995 var eitt kvink upp uppeftir.

Talva 11b. Útflutningur av laksi og prísgongd 1990 - 1995

| Ár | Útflutt | Rund vekt | Virðið | Kr/kg |
|---|---|---|---|---|

| | kg | kg | 1000 kr | Rund vekt |
|---|---|---|---|---|
| 1990 | 11.422.727 | 12.843.283 | 435.045 | 34,03 |
| 1991 | 15.731.735 | 17.990.167 | 542.231 | 30,14 |
| 1992 | 15.966.658 | 18.286.739 | 577.948 | 31,60 |
| 1993 | 15.321.412 | 17.582.098 | 468.233 | 26,63 |
| 1994 | 12.433.011 | 15.029.164 | 385.215 | 25,63 |
| 1995 | 6.908.857 | 8.943.477 | 231.289 | 25,86 |

Í Talvu 11c er lýst, hvussu stórur partur útflutningur av alifiski er í mun til samlaða føroyska útflutningin, skip tó undantikin. Í 1990 var alifiskur sløk 20% av samlaða útflutninginum og hækkaði fram til 1992 til sløk 25%. Seinastu tvey árini er nøgdin av alifiski til útflutnings lækkað og í 1995 var útfluttur alifiskur 11,7% av samlaða útflutninginum.

Talva 11c. Útfluttningur av alifiski samanborið við samlaða útflutningin

| Ár | Alifiskur útflutningur 1000 kr | Samlaður útflutningur 1000 kr | Aling av samlaðum % |
|---|---|---|---|
| 1990 | 436.760 | 2.314 | 19,9 |
| 1991 | 558.220 | 2.631 | 21,2 |
| 1992 | 597.647 | 2.398 | 24,9 |
| 1993 | 487.839 | 2.052 | 23,8 |
| 1994 | 396.411 | 2.026 | 20,3 |
| 1995 | 233.093 | 1.992 | 11,7 |

**Tøkk.**

Umframt tøkk til alararnar fyri beinasemi, tá vitja var á alistøðunum og fyri innsent tilfar, fari eg at takka Hagstovuni fyri tilfar um útflutning, Fiskasjúkutænastuni Sp/f fyri gjøgnumgongd av tilfarinum um lús og sjúku, Fiskaaling p/f fyri rættlestur og góð ráð og Ingvard Fjallstein fyri at hava gjørt myndirnar og lagt tilfarið til rættis til Alitíðindi.